# P/F Norlink latið skrivstovu upp í Vágsbotni

**Í sambandi við, at feløgini, P/F Heri Thomsen og P/F Vinna í Gøtu, hava stovnað felagið, Norlink, sum hevur keypt farmaskipið Norland úr Noregi, er skrivstova latin upp á Bryggjubakka 16 í Havn. Hetta eru hølini, har handilin, Samvinnufelagið, áður húsaðist**

NÝGGJ SKRIVSTOVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Her heldur nýggja skrivstovan hjá P/F Norlink til - á Bryggjubakka 16 í Havn*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Á skrivstovuni hjá P/F Norlink í Vágsbotni starvast í løtuni tveir mans, Jóhan Simonsen, sum er úr høvuðsstaðarøkinum og Eli Hansen, sum er gøtumaður.

P/F Heri Thomsen eigur 2/3 av felagnum, Norlink, og móðurfelagið, P/F Vinna, eigur 1/3.

### Økt virksemi

Tórhallur Thomsen sigur, at skrivstovan burtur av er latin upp í samband við økta virksemi hjá felagnum við sjóvegis-og nú eisini við loftvegis flutningi.

– Sjóvegis flutningurin verður við skipinum, sum felagið hevur keypt, meðan loftvegis flutningurin serliga snýr seg um eykalutir til verkstøð og annað, sum felagið tekur sær av fyri viðskiftafólk.

Hann sigur, at loftvegis flutningurin serliga verður brúktur, tá ið talan er um akuttar umstøður, har stundir ikki eru at bíða eftir sjóvegis flutninginum.

### Sjey mans

Tórhallur sigur, at Norland kemur til Føroya um mánaðarskiftið, februar/ mars, og tá verður farið undir regluliga sigling millum Føroyar og Danmark.

Hann sigur, at sjey mans verða umborð á skipinum í senn, og skiparar verða William Max Hansen, sum er av Eiði og Eifinnur av Reynatrø, sum er leirvíkingur.

– Norland er eitt kombinerað platta-og bingjuskip, sum lastar umleið 1500 tons, sigur Tórhallur Thomsen.



*Í løtuni starvast tveir mans á skrivstovuni, Jóhan Simonsen og Eli Hansen*

*Mynd: Bárður Lydersen*

# Trý skip landa svartkjaft á Havsbrún



*3.193 tons vá henda lastin hjá Krúnborg, tá ið saman um kom*

*Mynd: Yngve Olsen*

**Lastin hjá Krúnborg vá tilsamans 3.193 tons, ið er rættiliga nær tí, sum útrokningar siga, at skipið lastar eftir leingjanina í fjør heyst**

SVARTKJAFTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Líkt er til, at góði svartkjaftafiskiskapurin á leiðunum suður úr Írlandi heldur fram.

Finnur Fríði landaði umleið 2.600 tons av svartkjafti á Havsbrún hósdagin, og tá er skipið fult undir lúkurnar.

Á Havsbrún vita tey at siga, at Christian í Grótinum kemur inn at landa í dag við umleið 2.000 tonsum, og síðan kemur Sheanne við umleið 1.500 tonsum.

### Sløk 3.200 tons

Sosialurin hevur fylgt við, hvussu nógv lastin hjá Krúnborg vigaði, nú skipið fyrstu ferð hevði fulla last eftir leingjanina í fjør heyst.

Á Havsbrún siga tey, at lastin hjá Krúnborg vá tilsamans 3.193 tons, sum er rættiliga nær teirri metingi, sum útrokningarnar søgdu.

Reiðarin, Petur H. Jacobsen, hevur sagt, at skipið nú lastar 3.200 tons, og sigast má, at hetta er rættiliga nær hesi meting.

# Suðuroyingar fáa sjóvegis flutning til Danmarkar

**Nýggja farmaskipið hjá gøtumonnum, Norland, fer at sigla av Søldarfirði til Vágs og haðani til Hirtshals í Danmark. – Siglt verður úr Søldarfirði og av Vági einaferð um vikuna, sigur Tórhallur Thomsen**

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nú fáa suðuroyingar ein nýggjan flutningsmøguleika við farmaskipinum, sum P/F Norlink hevur keypt úr Noregi. - Vit fara at sigla av Vági og beinleiðis til Hirtshals, sigur Tórhallur Thomsen*

Tá ið farmaskipið, Norland, sum P/F Norlink í Gøtu hevur keypt úr Noregi, fer undir regluliga sigling millum Føroyar og Danmark, fáa suðuroyingar eisini eitt sjóvegis samband við umheimin.

Tórhallur Thomsen sigur, at Norland fer at sigla upp á tríggjar havnir, tvær í Føroyum og eina í Danmark.

– Siglt verður úr Hirtshals beinleiðis til Søldarfjarðar, har P/F Heri Thomsen hevur bygt stórt við avgreiðslu á havnalagnum. Síðan verður siglt úr Søldarfirði til Vágs, og haðani aftur til Hirtshals.

Spurdur, um felagið hevur tikið stigið at sigla av Vági eftir nógvu umrøðuna, sum støðan í Suðuroynni hevur fingið í fjølmiðlunum seinastu tíðina, sigur hann, at so er ikki.

– Nei, tað er longri síðan enn so, at vit tóku hesa avgerð. Tað var áðrenn, øll henda umrøðan byrjaði av álvara.

### Tæna báðum pørtum

Hann sigur, at felagið hevur avgjørt at sigla á Vág og av Vági aftur til Danmarkar, tí felagið metir, at hetta fer at loysa seg.

Tórhallur sigur, at við hesi flutningsleið fáa suðuroyingar ein nýggjan møguleika, tí einki verður til hindurs fyri at flyta fisk úr Suðuroynni til útlandið við skipinum.

Hinvegin fer ikki at bera til at flyta feskan fisk úr Eysturoy til virkingar í Suðuroy, men tað er so ein annar spurningur.

– Vit vóna, at suðuroyingar fara at brúka henda møguleikan, soleiðis at nýggja farleiðin kann tæna báðum pørtum, sigur Tórhallur.

Pakkhúsið, sum P/F Heri Thomsen hevur bygt í Søldarfirði, verður so goymsla av hjá teimum, sum velja at flyta farm við Norland.

Samstundis er pakkhúsið saltgoymsla og fóðurgoymsla umframt avgreiðslustaður hjá eitt nú Evos og Meginfelag Búnaðarmanna.

Tórhallur Thomsen sigur at enda, at Norland fer at sigla úr Søldarfirði og av Vági einaferð um vikuna.